# Oyggjablaðið

**Oyggjablaðið fer nú í jólafrí. Vit verða aftur í januar. Hinvegin geva vit út 11 bløð við jólatilfari henda næsta mánaðin**


**Oyggjaredaktiónin:**


Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo


Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo


Jens Kristian Vang
jensk@sosialurin.fo


## Eiði

**Í hesum blaðnum, sum er seinasta Oyggjablaðið í ár, er evnið Eiði og eiðisfólk. Lesið um:**


**Síða 16:** Eiðisfólk fækka

**Síða 17:** Tvey ættarlið saman

**Síða 18-19:** Kjartan byrjaði bara at yrkja

**Síða 20-21:** 100 pund uppá stampin

**Síða 22-23:** Góðir karmar um vinnulívið

**Síða 24-26:** Flyta inn í dreymahúsið komandi summar

**Síða 40:** Halló, tað er borgarstjórinr




**MINKAR**

*Hóast Eiði er vøkur bygd, kann hetta ikki forðað fólkatalinum í at minka ár undan ári*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Bert 612 á Eiði

**FÓLKATAL Hóast vinnuligt virksemi er á Eiði, er líkt til at fólk kortini flyta av bygdini. Fólkatalið er tað lægsta síðani 1998.**

Snorri Brend

**Eiði:** Tað vóru tær tíðir, tá nógv sethús vórðu bygd í nýggja býlinginum á Kolli.

Og hetta sást sum vera man eisini aftur í fólkatalinum. Tá flest fólk búðu í Eiðis bygd vóru tey 668 í tali.

Hetta var fyri sjey árum síðani, men síðani er talið minkað ár undan ári. Bara frá í fjør eru 23 fólk færri á Eiði.

Nógvar orsøkir kunnu vera til hetta: Fíggjarkreppan; færri arbeiðspláss í bygdini, og helst eisini, at trupult hevur verið at fingið lán til bygging av sethúsum í bygdini.

Sum víst á aðrastaðni í blaðnum er bert eittans sethúsið í gerð á Eiði í løtuni.

Í 1985 búðu 573 fólk á Eiði; 10 ár seinni 575, og í 2005 660. Í dag eru tey 612 í tali.

Hagtølini frá Hagstovuni vísa eisini, at 59 børn eru undir skúlaaldur.

### 59 undir

Tá vit fóru inn í nýggja árið vóru tey 611 fólk á Eiði.

Hesar seinastu 11 mánaðirnar hevur fólkatalið svingað eitt sindur.

Tað var lægst í mars mánaði, tá tey einans vóru 605 fólk í bygdini.

Eins og so nógva aðrastaðni flyta nógv fólk úr Føroyum í august mánaði, tá miðnámsskúlar og hægri útbúgvingar byrja.

Bara í august mánaði fluttu sostatt sjey fólk av Eiði burtur í onnur lond.

Annars kann staðfestast, at higartil í ár eru tvey fólk deyð, meðan fýra nýggir heimsborgarar hava sæð dagsins ljós á fyrsta sinni.

Hagtølini frá Hagstovuni vísa haraftrat, at í august mánaði í ár búðu eins nógv fólk her sum í september mánaði í fjør.

# Innandura kapping á Eiði

**Aftur í ár verður skipað fyri innandura fótbóltskapping á Eiði. Kappingin verður leygardagin 4. desember og sunnudagin 5. desember.**

**Aldursbólkar:**
PINKUR 7 - 9 ár (F. 2001 - 02)
GENTUR 10 - 11 ár (F. 1999 - 00)
SMÁGENTUR 12 - 13 ár (F. 1997 - 98)
GENTUR 14 -17 ár (F. 1993 - 96)
KVINNUR 18 ár og eldri (F. 1992 - )
PINKULINGAR 6 - 7 ár (F. 2003 - 04)
SMÁPILTAR 8 - 9 ár (F. 2001 - 02)
PILTAR 10 - 11 ár (F. 1999 - 00)
SMÁDREINGIR 12 - 13 ár (F. 1997 - 98)
DREINGIR 14 -16 ár (F. 1995 - 96)
UNGLINGAR 17- 19 ár (F. 1992-94)
MENN 20 ár og eldri (F. 1991 - )
OLD BOYS 35 ár og eldri (F. 1976 - )

Við liðunum hjá gentum 14-17 ár, dreingjum, unglingum, kvinnum, old boys og monnum, eru fýra leikarar, málverji íroknaður. Við hinum liðunum leika fimm leikarar, málverji íroknaður.

Loyvt er at hava ein skiftisleikara á hvørjum liði. Liðini skulu hava egin nøvn, ella nevnast eftir fótbóltsfeløgum.

Heiðursmerkir verða latin til nr. 1, 2 og 3 í hvørjum aldursbólki.

Tilmelding kann gerast á tlf. 59 80 62 ella við at senda teldupost til ebstreym@olivant.fo, í seinasta lagi hósdagin 2. desember kl. 19.

Kostnaðurin er 250 krónur fyri hvørt liðið.